

www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 07 - 2013

# Stril Krúnborg tekur skap

Arbeiðið at smíða skrokkin til nýggju Stril Krúnborg gongur framvegis væl. Skrokkurin er við at taka skap og hómast nýggja frálandafarið hjá havnareiðarínum á pólsku skipasmiðjuni "Vistal", sum liggur í Gdynia Ætlanin er, at skrokkurin skal verða klárur at sleipa til norsku skipasmiðjuna Simek í Flekkefjord seinast í hesum árinum. Her verður skipið so gjørt liðugt at lata eigarunum miðjan mai í 2014. Tað er Krúnborg Offshore P/F, sum saman við norska reiðarínum Møkster letur skipið byggja, Petur H. Jacobsen, stjóri sigur við oljan.fo, arbeiðið gongur sum ætlað og síggja tey fram til dagin, tá nýggja skipið verður latið eigarunum. Í samrøðu við oljan.fo fyrr í ár segði Petur Háberg, at hetta er ein spennandi og avbjóðandi broytingartíð hjá felagnum, sum sær stórar møguleikar í altjóða frálandavinnuni. Hann heldur avgjørt, at hetta er eitt vinnuøki, sum føroyingar eiga at vera við í. Vit hava fólkini og royndirnar og ikki minst tað dirvi og virkisfýsni, sum skal til. Bygt verður á herðarnar hjá teimum, sum slóðaðu fyri og eru farin og vit taka ímóti framtíðar møguleikum og avbjóðingum við opnum ørmum til frama fyri øll, sum búleikast á hesum klettum.? Myndir: Frá arbeiðinum uppá skrokkin til Stril Krúnborg í Pólandi. Myndatøka: Krúnborg Offshore